VIÐMERKINGAR

Ein gamal og tó nýggjur boðskapur

Jólaboðskapurin um frið á jørð og um góðan tokka millum menniskju er nú meira enn tvey túsund ára gamal. Kortini er hesin boðskapur nýggjur á einhvønn merkiligan hátt. Sum árið líður í einum heimi, sum ber sterkan dám av ófriði, hatri, yvirgangi, hungri og halli, kennist hesin gamli jólaboðskapur á hvørjum ári nýggjur og sera viðkomandi. Tað er ikki ov nógv sagt, at okkum hevur sjáldan verið so mikil tørvur á friðarsboðskapinum sum júst í við endan á einum ári við ógvusligum hendingum, serstakliga í útheiminum.

Her heima tykist tað, sum tjóðin er við at fara í tvíningar, og djúp ósemja er um grundleggjandi etiskar spurningar eins væl og um mannarættindi. Kanska hava hesar ósemjur altíð verið har, vit hava bara ikki tosa um tær og nú er so hol komið á. Í slíkum umstøðum er bert eitt, ið hjálpir, tað er at tala um tingini, at hava ein opnan støðugan dialog. Ein fortreytin fyri fólkaræði er rætturin til at vera ósamdur. Til hetta hoyrir eisini, at vit eiga at virða tey, sum vit eru ósamd við ella sum eru ósamd við okkum. Seinastu árini hava mong okkara havt lyndi til at gerast firtin ella ill við tey, sum ikki eru samd við okkum. Hetta er sera vandamikið fyri fólkaræðið og fyri samanhaldið í fólkinum. Her eru vit øll meira ella minni sek og kunnu vit tí øll bøta um hetta við at hugsa okkum um í nýggja árinum út frá jólaboðskapinum um frið á jørð og góðan tokka millum menniskju. Vit skulu øll vera her, og vit mugu læra at liva við tí, at vit eru ikki og vit kunnu ikki øll vera samd um alt.

Úti í heimi er lítil friður og enn minni góður tokki at hóma. Kríggið í Irak er vorðið ein vanlukka fyri hetta land og samstundis um at gerast ein tjóðskaparlig vanlukka av teimum stóru fyri USA. Forsetin gerst alt meira einsamallur og herfólkið í Irak er strongt og illa fyri. Hetta kann bert enda heilt galið við einum ómetaligum sorgarleiki fyri Irak sjálvt og risaveldið USA. Samstundis økist spenningurin í Miðeystri og í halga landinum er nú brostið á herviligt bróðurstríð sum ongum gagnar. Spenningurin økist í fjareystri og í Latínamerika prutlar undir lokinum. Afrika er eyðkent av sjúkum og hungursneyð og ein millión av børnum í hesum heimsparti eiga ikki mat í munnin – tríggjar milliónir fáa ikki skúlagongd. Samantikið ein døpur mynd av heimi okkara. Kortini royna flestu menniskju at varðveita vónina, vera bjartskygd og gera sítt besta í gerandisdegnum. Jólini minna okkum á, at vit øll eiga eina livandi vón við heimsins frelsara. Hann kom til okkara sum eitt lítið hjálparleyst og verjuleyst barn, gjørdist satt menniskja og leið harðastu lagnu fyri okkum. Í hesi vón liva vit og er hetta eitt gott støði, tá vit hvør í sínum lagi skulu royna at gera okkara besta sum menniskju. Hetta kunnu vit gera við hjálpsemi, við at virða hvør annan, sjálvt um vit eru rúkandi ósamd og hetta gera vit við at sýna solidaritet við tey mongu úti í heimi, sum liva í fátækt og neyð. Vit kunnu ikki minst nýta jólahalguna til at vera saman við familju og vinum, at sýna teimum tann kærleika og tann sóma, sum vit tíverri alt ov ofta gloyma í einum strongdum og pressaðum gerandisdegi. Tað gevur frið, yvirskot og góðan tokka. Við hesum ynskja vit lesarum og viðskiftafólki eini gleðilig jól.

Sosialurin

Sáttmálin hjá ísfiskalínuskipum bøttur í verandi formansskeiði

ÓLI JACOBSEB

Í samband við ísfiskalínusáttmálan hjá fiskimonnum skal verða gjørd henda viðmerking.

Undan 1971 gav sáttmálin hjá ísfiskalínuskipum 50% til manningina, men tá skuldi býtast til 2,5 eykapartar. Við verandi manningartali vildi hetta svara til 42,4% til manningina við javnbýti. Í mínum fyrstu samráðingum í 1971 kom parturin uppá 44,5% og nakað seinni uppá 45%.

Nøkur ár seinni vildu vit stuðla uppundir, at skipini fingu egningarmaskinu, sum bæði lætti um arbeiðið og kravdi minni fólk, so meira kom burturúr. Í fyrsta umfari fekk egningarmaskinan ein part, og svaraði hetta til um 3% av teimum 45.

Undir kreppuni fyrst 90-unum gav at kalla hvør einasti túrur hjá ísfiskalínubátum minstuløn, og svøvlalína varð roknað sum ein møguleiki at bøta um støðuna. Tá eftirlíkaðu vit at seta manningarpartin til 43%, treytað av, at skipini høvdu svøvlalínu.

Viðvíkjandiegningarmaskinuni varð nøkur ár seinni ásett, at hon fór av óbýttum. Hetta merkti, at luttøkan hjá manningini av hesum tiltaki fór niður í helvt.

Nøkur ár seinni varð ásett, at ein hálvur partur skuldi fara av óbýttum og aftur seinni varð ásett, at egningarmaskinan skuldi burtur úr sáttmálanum. Hetta seinna er hent eftir ásetanina um svøvlalínuna.

Støðan í dag er tann, at meðan parturin hjá línubátum í 1970 svaraði 42,4%, er hann í dag 43% + 1% (tils. 44%), sum reiðarar gjalda í eftirlønargjaldi. Tískil er parturin til manningina framvegis størri, enn hann var, og við teirri minking í manningartalinum, sum er úrslit av nevndu tiltøkum, er vøksturin í prosentpartinum pr. mann enn størri.

Í sama tíðarskeið er inntøkutrygdin munandi batnað, og saman við skattaskipanini hjá fiskimonnum eru fiskimenn yvirhøvur, og tað sama er galdandi fyri ísfiskalínuskip, munandi betri fyri nú enn tá.

Diskrimination av fiskimonnum

JAN HØJGAARD

Tá almennar nevndir verða valdar út, er ongantíð nakar fiskimaður uppí hesum nevndum. Hetta er í sær sjálvum at gera mismun á fólki, og er ósambærligt í einum fólkaræði. Tað er eisini sera ræðandi, at tey, sum manna hesar nevndir, í tíð og ótíð, koma við útsagnum, sum kunnu tulkast sum ein funtamentalistiskur hatur til fiskimenn. Hesar nevndir koma við tilmælum, ið eru sera trongskygd. Men tað í sær sjálvum er ikki so løgið; tí far vit at hyggja eftir hvør mannar hesar nevndir, so er tað fólk, ið so at siga ikki vita hvat tað er at arbeiða sum verkafólk. Tey kenna ikki til tað dagliga stríði, sum eitt nú fiskimaðurin útinnir. Hesi fólk eru borin á lógvum alt lívið, og sær tað út til, at tey ikki vita hvar pengarnir koma frá. Hesi fólk hava, í nógvum førum tikið sína útbúgving á tí vit kalla "hægri lærustovnum" í Danmark. Men støði er so lágt, at sjálvt fólk úr u-londum, hava kalla teir næmingar heim aftur, og kravt goldna peningin aftur. Hesi fólk klára ikki at forsyrgja sær sjálvum, og tíansheldur nøkrum øðrum. Tað hevði tí verði uppá tíðuna, at eitt nú fiskimenn komu inn í hesar nevndir, so teir kundu voksið um sjónarringin í hesum nevndum. Hetta eigur at verða tikið til eftirtektar, tí tað er eisini ein partur av fólkaræðnum, at allir partar eru umboðaðir.

Taktikkurin hjá Dan R. Petersen:

Nú skulu onnur ger skitna arbeiðið

ÓLI JACOBSEB

Nú er Dan R. Petersen komin í jólahýri. Tá ræður um at fáa onnur at gera skitna arbeiðið fyri seg, og sæst hetta í stubbum, sum hansara fremsti stuðul hevur havt í bløðunum í vikuni, og har boðskapurin er, at eg skal vera "í lummanum hjá reiðarum". Hetta sigur sum so alt um støðið.

Eg havi longu svarað fyrru "søguni", sum stavar frá 1999 og er um uppsagnarløn hjá ávísari manning. Har hava avvarandi fiskimenn váttað, at teir einki útistandandi hava við FF í hesum málinum.

Seinna søgan er enn eldri, og snýr seg um landingarløn hjá ávísum trolaranum, og sum eisini varð loyst tá fyri nærum 10 árum síðan. Tað er rætt, at Mortan Berjarstein, sum annars er ein skilamaður, var við í hesum máli. Men avgerandi ávirkanina høvdu vit sjálvandi.

Her er talan um mál frá farnu øld, sum eins og nógv onnur mál, sum FF hevur arbeitt við, hava fingið eina loysn, soleiðis sum tað hendir hjá einum seriøst arbeiðandi fakfelag.

Fyri tann, sum ikki veit tað, kann upplýsast, at hendan stílin hjá Dan nýtir hann eisini í sínum politiska arbeiði, enntá innanhýsis í Javnaðarflokkinum.

Spurningur er, hvør stílurin ið gevur betri úrslit. Eg skammist ikki við av mínum úrslitum. Úrslitið av stílinum hjá Dan talar eisini fyri seg!!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.